NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Føðingar

15. august fingu Ansa og Arnold Mortensen, ættaði úr Klaksvík og búsitandi í Hirtshals, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3520 gr.

18. august fingu Enn Gertrud og Leif Lützsch, Tønder, tríburar, dreingir. Annar var 42 cm. og vigaði 1625 og hin var 41 cm. og vigaði 1455 gr.

22. august fingu Diana og Niels Bertholdsen, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm. og vigaði 4250 gr.

25. august fingu Evi Tommysdóttir Tausen, Froðba og Gudmundur Djurhuus, Porkeri ein son. Hann var 51 cm. og vigaði 3100 gr.

27. august fingu Beinta Sørensen og Anton Egholm, Hoyvík, eina dóttur. Honv ar 52 cm. og vigaði 3500 gr.

30. august fingu Gerda Jónsdóttir, Hósvík og Thomas Hensing, Keypmannahavn, ein son. Hann var 51 cm. og vigaði 4570 gr.

31. august fingu Ennika og Eyðfinn Joensen, Hov, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 4130 gr.

31. august fingu Eyðbritt Petersen og Sørin S. Danielsen, Toftir, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 4200 gr.

31. august fingu Heidi og Tórur Jørgensen, Argir, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3900 gr.

75 Ár

8. september verður Johild á Løgmannsbø 75 ár.
Dagurin verður hildin hjá dóttrini Randi, um kvøldið.

90 Ár

Mánadagin 8. september verður Jóhanna Andrea (Hanna) Durhuus, Vestmanna 90 ár.
Dagurin verður hildin saman við børnunum. Tey, ið vilja heilsa uppá Hannu kunnu koma til ein drekkamunn sunnudagin 7. september kl. 15.00-18.00.

Andlát

28. august
Torkil Strøm, Vági, 90 ár

29. august
Johan Ziskason, fyrrverandi leiðari á Vaktar- og Bjargingarstøðini, 74 ár

30. august
Katrin amalia Fuglø, født Hansen, Hattarvík,65 ár

31. august
Erna Danielsen, Havn, 67 ár
Karl Martin Smith, Oyri, sonur Dorith og Kjartan, 20 ár
Naina Soll, født Mouritsen, Sørvágur, 54 ár

02. september
Jaspur Klakkstein, skipari, Klaksvík, 71 ár
Marjun Petersen, Tórshavn, 60 ár
Jóhannes Sørensen, Skála, 81 ár
Andrea á Regni, Toftir, 85 ár
Ólavur Nielsen, Sandavágur, 40 ár

03. september
Helga Jacobsen, Kaldbak, 85 ár
Inga Maria Østerø, Skálafirði, 89 ár
Finnur Lómstein, Tórshavn, ættaður úr Syðrugøtu, 60 ár
Anton Helgi Hendriksen, Sørvágur, 63 ár

Gullbrúdleyp: Hans og Hannefía Poulsen, Klaksvík

Í dag, 6. september 2003, kunnu Hans og Hannefía Poulsen í Klaksvík halda gullbrúdleyp.
Hans er kendur frá posthúsinum í Klaksvík, har hann arbeiddi frá fyrst í 60-unum, til hann fór frá við eftirløn. Hann er sonur Poul Johan og Onnu Sofiu (Annefíu) Poulsen í Stovugarðinum í Uppsølum í Klaksvík. Hans tók eisini við Stovugarðsfestinum eftir faðir sín.
Hannefía er kend frá heimahjálpini í Klaksvík, har hon arbeiddi í mong ár - tey seinastu sum leiðari. Hon var millum teir fyrstu heimahjálpararnar í Føroyum. Hannefía er dóttir Sigmund Niclasen úr Kunoy, sum doyði ungur, og Anniu, sum giftist uppaftur við Daniel Danielsen á Húsum.
Hans og Hannefía fingu 4 synir og eina dóttir, Sigmund, Anna, Símun, Anfinn og Jón Harald.

Jeanna Jensen 75 ár

Í dag, leygardagin 6. september, fyllir Jeanna Jensen, f. Rubeksen, undir Svartafossi í Havn, 75 ár.
Jeanna er født í Havn, og foreldur hennara vóru Samuel Sofus Rubeksen, vanliga nevndur Sámal í Smiðjustovu, og Agnes Rubeksen, f. Jacobsen, ættað úr Norðastovu á Toftum.
Jeanna var gift við Holger Jensen, møbilhandlara frá Broager í Jútlandi, sum doyði í 1986.
Tey bygdu sær hús undir Svartafossi, har foreldrini hjá Jeannu høvdu bygt, og býr Jeanna har enn í dag.
Jeanna og Holger høvdu stóran møbilhandil í Havn, og vóru tey saman um hetta, til tey stongdu handilin í áttatiárunum.
Tey hava eisini verið virkin innan ymiskt felagslív í Havn, og vóru tey m.a. við til at stovna Dansifrøi, og er Jeanna enn í dag virkin í felagnum. Eisini gongur hon nógv upp í síni børn, ommu- og langommubarn.
Jeanna og Holger fingu tvær døtur, onnur býr í Svendborg í Danmark og hin í Havn.
Føðingardagurin verður hildin saman við børnunum í Danmark.

Tórshavnar kommuna nýggjan vatnmeistara

18. august 2003 bleiv Tróndur við Á í Havn settur sum vatnmeistari í Tórshavnar Kommunu.
Tróndur er 40 ára gamal, føddur í Havn og flutti sum fimm ára gamal til Velbastaðar at búgva. Hann er sonur Jonnu F. Olsen og Jógvan við Á.
Tróndur fór sum ungur til skips við trolara. Frá 1982-84 var hann á landbúnaðarskúla í Stend í Norra. Frá 1984-87 koyrdi hann lastbil hjá Just Sivertsen í Havn. Síðan fór hann í læru sum maskinsmiður hjá Nomatek í Havn. Sum útbúgvin maskinsmiður fór hann á maskinmeistaraskúla og fekk maskinmeistaraprógv í 1993. Hann sigldi sum maskinmeistari við farmaskipum hjá Skipafelagnum Føroyar frá 1993-97. Síðan sigldi hann sum maskinmeistari hjá donsku reiðaríunum C.J. Shipping og Thor Chartering til 2000. Hann hevur eisini arbeitt aftur hjá Nomatek. Seinasta hálvtannað árið hevur hann siglt við rækjutrolaranum Hvilvtenni.
Tróndur er giftur við Hannu, f. Egholm, úr Havn, og eiga tey fýra børn: Katrina, Jens Petur, Jógvan Fríði og Jonna Maria.
Vatnmeistarin hevur dagligu leiðsluna av vatnverkinum um hendi og hevur m.a. rakstrarábyrgd av viðlíkahaldi og útbygging av vatnverkinum.
Í kommununi eru átta størri og smærri reinsiverk.
Samlaða vatngoymslan í kommununi er 1.400.000 rúmmetrar, árliga nýtslan er 3.500.000 rúmmetrar.
Fyrrverani vatnmeistarin, Janus Sørensen, fer frá fyri aldur 1. februar komandi ár.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Valdemar Lützen 50 ára starvsdag

1. september 2003 hevði Valdemar Lützen starvast í 50 ár í familjufyritøkuni P/f Valdemar Lützen í Havn.
Valdemar er sonur Ellen, f. Erlingsson, ættað úr Fámjin, og Mogens Lützen í Havn.
Sum 16 ára gamal fór hann í 1949 til Danmarkar í Handilslæru. Leiðin gekk til Holbæk, har hann stóð í læru hjá handilsfyritøkuni »Bjørns Efterfølger«. Eftir lokna skúlatíð fór hann til Newcastle í Onglandi, har hann arbeiddi sum skrivstovumaður í eitt tíðarskeið. Í 1953 flutti hann so til Føroyar at føra familjufyritøkuna Valdemar Lützen víðari. Hetta gjørdi hann m.a. við at opna handilin niðri í Vágsbotni 1. desember 1953.
Valdemar hevur havt fleiri nevndarstørv, eitt nú á Føroya Handilsskúla og í Prísráðnum. 1. desember 1976 bleiv hann franskur konsul í Føroyum, eftir at pápin, Mogens Lützen, legði frá sær, hetta starv røkti hann til hann fylti 70 ár.
Valdemar giftist í 1959 við Nannu, f. Heinesen, úr Brekkuni, í Klaksvík.
Nanna og Valdemar eiga fimm børn, tey eru: Elin, sum býr í Hoyvík, Halldis, sum býr í Havn, Sunniva og Valdemar, sum bæði búgva í Danmark, og Høgni, sum býr í Havn. Tey eiga eisini sjey ommu- og abbabørn.
Valdemar er fjórði persónur, sum hevur starvast hjá P/f Valdemar Lützen í 50 ár. Fyritøkan fyllir 100 ár í 2004.
Móttøka var í gjár, fríggjadagin 5. september, á skrivstovuni hjá P/f Valdemar Lützen á Skálatrøð.

Valdemar Lützen á skrivstovuni saman við eini bringumynd av abbanum, Valdemari Lützen

Mynd: Jens Kr. Vang

Suðuroyar Sparikassi fimm ár í Havn

Jóannes S. Hansen, deildarstjóri í Suðuroyar Sparikassa
Mynd: Jens Kr. Vang

Mikudagin 3. september vóru liðin 5 ár síðan Suðuroyar Sparikassi lat upp eina deild í Havn. Hendan dagin bjóðaði bankin kransakøkur, kaffi og karamellur til tey sum stukku inn á gólvið.
Høvuðsdeildin hjá Suðuroyar Sparikassa er í Vági og ein deild er í Porkeri. Mikkjal Sørensen í Porkeri er stjóri í Suðuroyar Sparikassa.
3. september 1998, sama dag sum deildin í Havn lat upp, byrjaði Jóannes S. Hansen sum deildarstjóri hjá Suðuroyar Sparikassa.
Tá vit spyrja Jóannes, um tað var røtt avgerð at lata upp deildina í Havn, sigur hann, at tað var ein skilagóð avgerð. Tey fáa dagliga nýggjar kundar, hetta eru ikki bert suðuroyingar, men fólk úr øllum landinum, serliga úr høvuðsstaðarøkinum.
Tað at telefonnummarið hjá Suðuroyar Sparikassa í Havn er 321998, er ikki heilt tilvildarligt, deildin lat upp í 32. viku í 1998.
Í dag starvast seks fólk á deildini í Havn.

Jørgen Niclasen 3. næstformaður

Tíðindaskriv frá Fólkaflokkinum

Frá 1. september 2003 er Jørgen Niclasen 3. næstformaður í Løgtinginum. Hetta starv hevur Óli Breckmann higartil havt.
Edmund Joensen, løgtingsformaður, nýtti høvi ð í tinginum í dag at takka Óla Breckmann fyri gott samstarv og ynskti samstundis Jørgen Niclasen vælkomnan sum 3. næstformann í Løgtinginum.

Dagurin

6. september. Magnus, deyður í umleið 750. Sankta Magnus var einabúgvi, sum saman við fleiri øðrum einbúgvum í langa tíð helt til við Bodenvatnið á markinum millum Týskland og Sveis. Seinni fór hann sum trúboðari til Bayern, har hann læt byggja eitt kleystur. Kemur ofta í bland við aðrar Magnusar, eitt nú ein Magnus, sum sigst at vera tikin av døgum um ár 250, og við tann Magnus, sum magnusarmessa verður hildin fyri. Navnið er latínskt og merkir *stórur.*

7. september. Robert. Teir vita ikki, hvønn sipað verður til, navnið kemur ikki fyri í álmanakkanum fyrr enn í 1728. Kanska er talan um ein abbata í Kent í Onglandi. Germanskt navn, samansett av orðum, ið merkja *tiltikin og ljómandi.*

8. september. Mariumessa um heystið. Hildin sum føðingardagur Mariu.
Dagurin er dilkadagur. Tríggir dagar um heystið verða nevndir dilkadagar. Teir eru mariumessa 8. september, mikkjalsmessa 29. september og alhalgunardagur 1. novenber. Tá var okkurt serstakt havt til matna, helst av seyði, og dilkur var tann matur róptur, sum etin varð.

PRÓGV

Við Universitetið í Bergen hevur Karin Margretha Húsgarð Larsen, Tórshavn, tann 29.8.03 lokið prógv sum »Cand Scient. við Oceanografi« sum høvuðsfak.

Hanna í Horni hevur tikið prógv sum Master of Arts í altjóða politikki á University of Wales Swansea.

BRÚDLEYP

Í dag, 6. september kl. 14.00 giftast í Gøtu kirkju Judy Torleifsdóttir Justinussen, Norðragøta og Petur Jacob við Gjónna, Fuglafjørður. Døgurði verður fyri innboðin. Vælkomst er heima hjá Torleif og Beintu í Norðragøtu eftir kl. 21.00.